# Tvær fyritøkur eitt mál




**Árni Joensen eigur bæði Plastprent Føroyar og Saltkeyp. Tvær púra ólíkar fyritøkur, men málið er tað sama: At veita góða tænastu**

Plastprent Føroyar hevur nú góð tvey ár á baki. Fyritøkan framleiðir so at siga alt innan plastikk, einki ov lítið og einki ov stórt.

- Vit fáast eisini við at prenta á plastlutir, tað veri seg beriposar ella pakkitilfar, sigur Árni Joensen.

Úrvalið er stórt og umfatar alt frá plasttilfari rundan um plattar til eingangs handskar, og fyritøkan má metast sum ein heilsøla.

- Vit framleiða tað mesta sjálvir, men kunnu eisini útvega serliga eftirspurnar vørur. Til dømis útvega vit beriposarnar til Magn, og hesir eru biologiskt niðurbrótiligir. Hyggur tú í vinstra niðara horn sær tú tað skrivað har. So hetta eru beriposar, sum ikki dálka náttúruna, sigur Árni Joensen.

Tað er tó ikki bert plast, sum teir útvega.

- Pakkitilfar er oftast plast ella papp, og vit kunnu eisini útvega pappeskjur við prenti á, og vit hava eisini kundar sum ynskja tað, sigur Árni Joensen.

Men tað allarmesta framleiða teir sjálvir á Plastprent Føroyar.

## Selja salt

Hin fyritøkan hjá Árna Joensen er Saltkeyp.

- Tað var nakað av einari tilvild, at eg kom upp í hetta. Íslendski Hafnabanki átti eina fyritøku á Skálafjørðinum sum seldi salt, Saltkaup. Hana yvirtók Thomsen í Gøtu, men tá hann so seldi alt sítt virksemi til Faroe Ship, hoyrdi saltsøla ikki undir teirra virksemi. Eg varð so fyri góðum ári síðani boðin at yvirtaka saltsøluna, og tað gjørdi eg so, sigur Árni Joensen.

Tað er gott ár síðani, at hann yvirtók Saltkeyp, og saltið hevur tveir upprunar.

- Vit fáa salt av Bahamas, sum er tað betra saltið. Tað verður mest nýtt til laka. Síðani fáa vit eisini salt úr Tunis, sigur Árni Joensen.

Saltið verður selt í 1000 kilo sekkjum og niður í 25 kilo sekkir.

- Tað eru mest flakavirkir, og flakatrolarar, sum keypa, men eisini selja vit nakað til Landsverk og til kommunurnar, sigur Árni Joensen.

Hetta er mest í stórum nøgdum, og vanliga keypa flakavirkini ein heilan bil í senn, tað vil siga 20 tons.

- Tað hendir seg eisini at menn koma framvið at keypa nakrar sekkir, men tað eru ofta grindamenn ella nátamenn, sigur Árni Joensen.

Bæði Plastprent Føroyar og Saltkeyp verða við á FaroExpo komandi viku.





FISKIVEIÐIEFTIRLITIÐ
Yviri við Strond 3
Postboks 1238
110 Tórshavn
email: fve@fve.fo
Telefon 31 10 65
Telefax 31 39 81
www.fve.fo

FISKIVEIÐIEFTIRLITIÐ
er stovnur undir Fiskimálaráðnum, og hevur skrivstovu í Tórshavn

Sambært løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap, fyrisitur Fiskiveiðieftirlitið, eftirlit á sjógvi og landi.

Fiskiveiðieftirlit á sjónum verður útint av skipum hjá Fiskiveiðieftirlitinum og donsku sjóverjuni.

Umframt at útinna eftirlit í føroyskum sjógvi, luttaka føroysku eftirlitsskipini eisini í altjóða sjógvi.

Her er serliga talan um NAFO- og NEAFC skipanarøkini.

**Av øðrum uppgávum kunnu nevnast:**

- Eftirlit og skráseting av fiskidøgum.
- Eftirlit og skráseting av kvotum og hjáveiðikvotum.
- Eftirlit og skráseting av kvotum á fjarleiðum.
- Eygleiðaraskipan.
- Fylgisveinaeftirlit við skipum.
- Góðkenning av innvigingarskipanum.
- Eftirlit við upp- og umskiping av frystum fiski (Port State Control).
- Eftirlit við avreiðingum hjá føroyskum skipum í útlendskum havnum.



FVE FISKIVEIÐIEFTIRLITIÐ
Faroe Islands Fisheries Inspection



www.fve.fo